# Sjóvinnusavn og upplivingardepil við Áir


*Upplivingardepil við Áir*

**Gamla hvalastøðin við Áir skal setast í stand og nýtast til sjóvinnusavn og upplivingardepil. Økið við Áir er eisini væl egnað til kampingpláss, smábátahavn og annað virksemi**

MENTAN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


*Armgarð Weihe, fulltrúi í Mentamálaráðnum, handar Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum, ávegis álit um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Á tíðindafundi mánadagin handaði Armgarð Weihe, fulltrúi í Mentamálaráðnum, Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum, vegna nevndina ið varð sett nevnd at kanna spurningin um varðveiting av hvalastøðini við Áir, ávegis álit um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn.

Hvalastøðin við Áir hevði stóran búskaparligan týdning fyri Sundalagið frá tí hon varð bygd í 1905 og hálva øld fram. Støðin hevur allar dagar drigið fólk at sær og hevði stóran búskaparligan týdning fyri Sundalagið í fyrru helvt av 20. øld. Sum sjóvinnusavn fær hvalastøðin aftur møguleika at draga børn og ung, familjur og ferðafólk at sær - hesaferð sum partur av upplivingardepli í Sundalagnum.

Seinastu nógvu árini hevur hvalastøðin staðið óvirkin, men nú er aftur møguleiki fyri, at hvalastøðin kann gerast virkin. Hesuferð ikki sum ídnaðarverksmiðja, men sum sjóvinnusavn og upplivingardepil.

Tað var Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sum á heysti 2006 setti eina nevnd at kanna spurningin um varðveiting av hvalastøðini við Áir. Í nevndina vórðu sett Andras Mortensen, landsantikvarur, Føroya Fornminnissavn, Dorete Bloch, stjóri á Føroya Náttúrugripasavni, Jógvan Mørkøre, bygdaráðslimur í Sunda kommunu, sum í februar varð settur í nevndina fyri Heðin Zachariassen, borgarstjóra, og Armgarð Weihe, fulltrúi í Mentamálaráðnum, nevndarforkvinna. Ole Jensen, arkitektur á Landsverk, varð settur sum ráðgevi hjá nevndini. Í dag hevur so landsstýrismaðurin í mentamálum fingið handað ávegis álit frá nevndini um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn.

Álitið vísir á, at hvalastøðin við Áir er varðveitingarverd sum dømi um ídnaðarsamfelagið, ið tók seg upp í Føroyum síðst í 19. øld.

**Tann einasta á norðaru jarðarhálvu**

Hvalaveiðan hevði stóran týdning í tátíðar samfelagnum, og hvalastøðir vórðu bygdar um allan heim. Sjey av teimum vóru í Føroyum. Í dag er mest sum øll hvalaveiða burtur og harvið eisini tær allarflestu hvalastøðirnar. Hvalastøðin við Áir er seinasta hvalastøðin í Føroyum og tann einasta, ið er eftir á norðaru jarðarhálvu. Á sunnaru hálvu eru hvalastøðir varðveittar í Albany, í Avstalia og í Grytviken á South Georgia. Hvalastøðin við Áir er tí eisini varðveitingarverd sæð úr alheims sjónarhorni.

Økið við Áir er væl egnað til campingpláss, smábátahavn, matstovu- og ráðstevnu-virksemi og við hvalastøðini sum høvuðsatdrátti kann ymiska virksemið í upplivingardeplinum stuðla undir hvørt annað, so lønandi vinna fæst burturúr.

Álitið staðfestir, at tað er í tøkum tíma, at avgerð verður tikin um, at hvalastøðin skal varðveitast. Tørvur er tó á nærri fyrireikingararbeiði áðrenn endaligt uppskot um savns- og upplivingardepil kann fyriliggja, og neyðugt er við knappari millión kr.á komandi løgtingsfíggjarlóg til endamálið.

## Niðurstøða

**Mælt verður til:**

- at prinsippavgerð verður tikin um, at hvalastøðin við Áir verður varðveitt sum savn
- at økið við Áir verður skipað sum ein depil fyri ferðavinnu og mentanarsøguligum upplivingum við serligum atliti at sjóvinnu
- at virksemið verður skipað í samstarvi millum land, kommunu og privata vinnu
- at eitt stýri, útnevnt av landsstýrismanninum í mentamálum og Sunda kommunu verður sett til at standa fyri fyrireikingararbeiðinum
- at ein játtan verður sett á paragraf 7 í løgtingsfíggjarlógini áljóðandi kr. 990.000 til "Hvalastøðina við Áir" til bráfangis viðlíkahald og tøkniligt fyrireikingararbeiði.
- at stýrið kannar møguleikar fyri eksternari fígging til umvæling av hvalastøðini og uppbygging av sjóvinnusavni





*Hvalastøðin við Áir. Hvalaveiðan hevði stóran týdning í tátíðar samfelagnum, og hvalastøðir vórðu bygdar um allan heim*

*Myndir: Fornminnissavnið*